# Útlendingar tiknir

Myndugleikarnir í Iran siga nú, at fleiri útlendskir ríkisborgarar vórðu tiknir undir ófriðinum í Teheran og øðrum býum upp undir ársskiftið. Tað almenna sjónvarpið sigur, at útlendingarnir róku tað, sum sjónvarpið kallar "sálarliga krígsførslu" ímóti iransku stjórnini. Iranskia fregnartænastan sigur, at útlendingarnir komu til Iran í sambandi við ta átrúnaðarligu hátíðina ashura, men einki verður sagt um, hvørjum londum teir eru úr. ES hevur fordømt framferðina hjá iransku løgregluni ímóti mótmælisfólkinum.



# ES eyka toppfund

ES-forsetin, Herman Van Rompuy, sum av álvara byrjaði í nýggja starvi sínum í gjár, hevur longu sent boð eftir ríkis- og stjórnarleiðarunum, sum eru bidnir um at koma til fundar tann 11. februar. Van Rompuy sigur við tíðindastovurnar, at toppfundurin skal viðgera búskaparstøðuna í samveldinum og taka støðu til, um tað er neyðugt við nøkrum tiltøkum fyri at seta meiri ferð á búskaparvøksturin. Tað var framman undan avgjørt, at ES-leiðararnir skuldu halda toppfund í mars, og tann fundurin er framvegis á dagskránni.



*Inni í hesum tunli standa 150 kassar og nøkur tons av salti og bíða eftir at verða avheintað. Men inn sleppur kommunan ikki, hóast hon sjálv eigur tunnilin*

*Sum er, fáa kavaruddingarliðini ikki bilbukt við harðfrysta ísinum. Bert har, sum Bussleiðin koyrir og á høvuðsvegunum í kommununi klára teir at halda ferðsluni glíðandi*



figging til at fara at tryggja munnan. Arbeitt hevur leingi verið við at tryggja tunnilin innan, so henda støðan er ikki nýggj, men Arbeiðseftirlitið hevur nú staðfest, at tað er ótrygt at ganga undir munnnan, og tí er tunnilin stongdur, váttar Boði Haraldson og staðfestir, at arbeitt verður við at finna bestu loysnina, men at tað verður ikki nú meðan kavin liggur.

Tunlarnir við Brandstøðina verða nýttir av kommununi til at goyma ymiskt í, eitt nú liggur allur jólabýurin og bíðar eftir at sleppa inn. Men fyrr enn váttan er fingin fyri, at tunnilsmunnin er tryggjaður, fæst hvørki kassi ella salt úr tunlinum.

– Men trupulleikin er also ikki størri enn so, at tað eru einir 50 kassar, sum eru úti í býnum, og saltið fáa keypa vit frá Saltsøluni, sigur Boði Haraldson, býarverkfrøðingur.

Hann roknar tó við, at verður púra galið við salti og øðrum, so kunnu teir finna útav einari loysn við Arbeiðseftirlitinum, soleiðis at teir hava eftirlit meðan menn sleppa inn í tunnilin eftir saltinum og kassunum, og so kann tunnilin stongjast aftur.

Men inntil ein loysn er fingin á hesum, verður einki meira gjørt, og mugu tey, ið ikki hætta sær út, klára seg við einum gomlum føroyskum heimaráði og lata seg í skølingar.